Vestmanna Kommuna:

# Kæra til fútan um sýslumannin

**Hóast fútin ikki hevur givið bygdaráðnum boð um, at hann fer at flyta sýslumansstarvið úr Vestmanna, so hevur bygdaráðið mótmælt einari møguligari flyting. Borgarstjórin sigur seg hava frætt tíðindini aðrastaðni frá**



*Vandi kann vera fyri, at vestmenningar ikki leingi afturat fara at hava sýslumann í bygdini.*

SÝSLUR
*Heri á Rógvi*

Føroyar eru býttar sundir í seks sýslur. Hesar hava hvør sín sýslumann. Hesar kenna vit kanska best frá grindadrápi, men talan er í roynd og veru um løgreglumenn.

Á streymoynni hevur sýslumaðurin sæti í Vestmanna. Hetta, hóast fútin og ovastu løgreglumenninir hava sætið í Tórshavn. Vestmenningar hava havt gleði av sýslumansstarvinum síðani 1898. Sýslumaðurin í Vestmanna, Ivan Klein Olsen, hevur eisini, sum nú er, eitt skrivstovufólk knýtt afturat sær.

Men tað røkist fyri, at sýslumansstarvið í Vestmanna skjótt verður ein farin tíð fyri vestmenningar og onnur búgvandi á Streymoynni.

### Úr Vestmanna

Á bygdaráðsfundi 21. november samstykti Vestmanna bygdarráð at mótmæla ætlanini hjá fútanum, um at flyta sýslumansstarvið úr Vestmanna. Hin 12. desember sendi Vestmanna bygdarráð so eitt skriv til Føroya Landfúta, har mótmælt varð ætlanini at flyta sýslumansstarvið úr Vestmanna. Í skrivinum verður ikki víst til annað enn, at søgur eru farnar at ganga um hetta. Tað verður tó víst á, at bygdarráðið sendi eitt skriv til fútan í apríl mánaði í 1999.

Borgarstjórin, Gunn Joensen, greiðir frá, at bygdaráðið umvegis hevur frætt um ætlanir um at flyta sýslumansstarvið úr Vestmanna, og hetta skuldi eftir øllum at døma verið til Havnar.

–Vit frættu hesi tíðindini longu í 1999. Tá ringdi eg eisini sjálv til fútan (Mogens Nepper Christensen, blðm.), og hann greiddi frá, at tað varð arbeitt við einari ætlan um at flyta sýslumansstarvið úr Vestmanna, sigur Gunn Joensen.

Síðani tá hevur, í øllum førum alment, ikki verið so nógv sagt um málið. Vestmanna bygdarráð fílist eisini á, at einki svar nakrantíð er givið teimum í sambandi við skrivi í 1999. Bygdaráðið heldur tað eisini vera løgið, nú landsumsitingin arbeiðir við at miðspjaða almennar stovnar, at Føroya Landfúti uttan grund arbeiðir við at flyta sýslumansstarvið í Vestmanna øvutan veg.

Gunn Joensen sigur seg ikki kenna nakað til, at ónøgd hevur verið viðvíkjandi sýslumansstarvinum og tí, at hetta starvið hevur sætið í Vestmanna.

–Sýslumansstarvið hevur verið í Vestmanna síðani 1898, og hevur ikki verið til grund til at flyta starvið fyrr, so er enn minni grund til hetta at flyta tað nú

(...)

Harafturat kann Vestmanna Bygdarráð als ikki góðtaka, at eingin løgreglumaður kemur at hava starv við Vestmanna sum støði, um so verður, at ætlan fútans verður sett í verk, skrivar Vestmanna bygdarráð í skrivi Føroya Landfúta.

Skrivið er eisini sent til løgmann og varaløgmann. Teir báðir løgtingslimirnir úr Vestmanna, Jógvan O. Durhuus og Hans Pauli Strøm, havi eisini fingið hvør sítt eintak av skrivinum.

Gunn Joensen sigur at enda, at tað er ætlanin at fáa løgtingsmenninar at ávirka hetta, men annars veit hon ikki, hvørji stig bygdarráðið kann hugsast at fara at taka, verður álvari burturúr ætlanini hjá fútanum.




# ítróttur

Nr. 243 • leygardagur • 15.desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir hetta vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 16.12 | 13.30 | VB-Stjørnan | Hannis/Uni |
| 16.12 | 14.30 | VÍF-Neistin | Kári/Trúgvi |

1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.12 | 16.00 | KÍF-Tjaldur | Poli/Jústines |
| 16.12 | 16.00 | StÍF-Kyndil | Hjalmar/Kristian |
| 16.12 | 16.00 | VÍF-Neistin | Kári/Trúgvi |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.12 | 13.00 | Mjølnir-Dráttur | ÍF |
| 15.12 | 14.00 | Fleyr-TB | ÍF |

Meistaradeild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.12 | 15.00 | Mjølnir-SÍ | ÍF |
| 15.12 | 16.00 | Fleyr-Fram | ÍF |

# Spenningurin komin í helvt

**Í dag verða seinastu dystirnir í grundspælinum leiktir. Hjá monnunum er lagt upp til stórdyst millum Fleyr og Fram, sum bæði hava havt viðrák í seinastuni**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Jólini nærkast í hvørjum, og tað sama ger endin á grundspælinum í meistaradeildini hjá kvinnum og monnum. Í dag verða seinastu dystirnir í fyrru helvt av kappingini leiktir, og sostatt er hetta seinasti møguleiki hjá liðunum at vinna sær eitt so gott útgangsstøði sum møguligt til endaspælið, tá tað »veruliga« fer at telja.



*Talan verður um rættiligan stórdyst í Gundadalshøllini, har oddaliðið, Fram, skal royna seg móti einum væl koyrandi Fleyr-liði*

### TB til Havnar

Hjá kvinnunum er tað framvegis TB, sum er ovast. Aftaná fyrstu úrslitini hjá TB høvdu summi roknað við, at munurin nú fór at vera størri, enn hann er, men eftir góðu byrjanina hevur tað ikki verið heilt so lætt hjá TB í síðstu dystunum. Men TB-kvinnurnar eru stórfavorittar í dag móti Fleyr, sjálvt um tær spæla á útivølli.

Avrikini hjá Fleyr hava verið rættiliga svingandi í ár. Onkrir dystir hava verið út av lagi vánaligir, meðan aðrir hava verið á heilt góðari leið hjá havnarliðnum. Men í dag má avrikið vera betri enn tær higartil hava víst, um tær skulu gera nakað við oddaliðið.

Hin dysturin í dag er millum Mjølnir og Drátt, og hann sær nógv javnari út.

Vit minnast, hvussu hesi bæði liðini lógu stavn um stavn seinasta kappingarár, og undan dystinum í dag eru tey aftur púra jøvn. Tí hevur dysturin eisini ómetaliga stóran týdning fyri báðar partar, ikki minst tí tað kann roknast við, at TB vinnur í Gundadali.

Tá hesir báðir dystirnir eru avgreiddir, er tað bert dysturin millum Fleyr og ÍF, sum restar í at fáa grundspælið liðugt. Síðani verður fyrsta umfar í endaspælinum um eina viku, áðrenn kappingin fer í vetrarfrí. Hon byrjar aftur 12. januar.

### Lokaluppgerð

Tann næsta lokaluppgerðin í hesum kappingarárinum er á skránni í Gundadalshøllini í dag, og tað kann gerast sera spennandi. Fram er á odda í kappingini, men tá talan er um dystir millum hesi bæði liðini, hevur tað ikki so nógv at siga, hvar á stigatalvuni tey liggja.

Fleyr gjørdi bart í Sørvági síðsta vikuskifti, og teir fara at gera sítt ítarsta fyri at koppa hinum oddaliðnum eisini, so teirra egnu møguleikar í kappingini gerast betri. Men her hevur Fram eisini nakað at siga. Fleyr gjørdi teimum ein beina við at vinna móti SÍ seinast, men um tað ikki eydnast Fram at basa Fleyr í dag, kunnu teir ikki brúka úrslitið í Sørvági

til so nógv, tí so blandar Fleyr seg eisini av álvara í oddastríðið. So tað er lagt upp til stórdyst í Gundadalshøllini í dag.

Tað er tað fyri sovítt eisini í Klaksvík, har Mjølnir tekur ímóti SÍ. Hyggja vit eftir stigatalvuni, liggja sørvingar betur fyri, men munurin er ikki so ómetaliga stórur, og um klaksvíkingar ætla sær at vera við har tað hendir, skulu teir helst vinna í dag. Tað skal SÍ eisini, tí eftir ósigurin síðsta leygardag er tað altumráðandi ikki at missa tvey stig afturat í seinasta dysti í grundspælinum - og serliga ikki um Fram samstundis vinnur í Havn.

Hetta eru seinastu dystirnir í grundspælinum, og sjálvt um stigini verða koyrd í helvt aftaná hetta umfarið, so hava báðir dystirnir í dag nógv at siga fyri øll liðini. Tað er samband frá nummar eitt heilt niður til nummar fýra, og tað kann fara báðar vegir. Vinna Fram og SÍ í dag, leggja tey sjógv millum seg og hini bæði, men vinna Fleyr og Mjølnir, sær út til, at alt kann henda, tá endaspælið byrjar.

# Vinnarar av jólakappingini

*Teir tríggir fremstu í bólkinum fyri rørslutarnað. F.v. Marius Johansen, Sámal Jacobsen og Jóannes Ziska*



### Árliga jólakappingin í boccia varð hildin um vikuskiftið

BOCCIA
*Tíðindaskriv*

Um vikuskiftið skipaðu ÍSB og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli fyri árligu jólakappingini í boccia. Kappast varð í trimum bólkum. Menningartarnað, rørslutarnað og børn vóru í hvør sínum bólki.

Høvuðsstuðul sersambandsins, Føroya Lívstrygging, lat heiðursmerki til tey stinnastu.

Um 40 fólk vóru við í kappingini, og úrslitið varð:

Menningartarnað
Kristianna Kjærbø, Sumba
Unn Mortensen, Tórshavn
Símun Petur Zachariasen

Rørslutarnað
Sámal Jacobsen, Tórshavn
Jóannes Ziska, Tórshavn
Marius Johansen, Tórshavn

Rørslutarnað børn
Dánial Jákup Djurhuus, Strendur
Ella Maria Rasmussen, Klaksvík
Jan Dávur Dam, Kollafjørður